**Skúlastýrisfundur nr. 5 – 2025**

**Stað:** Skúlin á Argjahamri – Stórastova
**Dato:** 07.10.2025
**Fundartíð:** 16.00–19.00

**Møtt til fundar:**

- Ása Christiansen, skúlastýrisforkvinna
- Guðrun Kerá, foreldraumboð
- Paula Neshamar Thomassen, foreldraumboð
- Høgni Vilhelmsen, kommunustýrisumboð
- Louisa Niclasen, læraraumboð
- Marin S. Bláberg, skrivari

---

**Mál á skrá**

---

**1. Næmingaráðið í Miðdeild á fundi við skúlastýrið**

**Umboð:** Lusia og Óli

Næmingaráðið í Miðdeild arbeiðir við ymiskum evnum. Hetta vóru høvuðspunktini, sum tey løgdu fram fyri skúlastýrinum:

- Ynskja at sleppa at keypa í Á-handlinum eina ferð um vikuna.
- Ynskja at brúka mikroovn eina ferð um vikuna fram til jól og tvær ferðir um vikuna eftir jól.
- Ynskja, at ábøtur verða gjørdar í brúsurúminum hjá gentunum. Brúsirnar eru kaldar, og ofta er eingin sápa.
- Ynskja nýggjar sofur til Miðdeild – við lágum beinum.
- Ynskja at sleppa at hava telefonir við í skúla, men tær skulu liggja sløktar í taskuni.
- Ynskja at fáa eina uppvaskimaskinu í skúlakøkin, tí ofta eru køkstingini ikki reinsað, tá tey skulu brúkast.
- Ynskja at fáa fyrrikløð í skúlakøkin.
- Ynskja nýggjar skuffur til skúlastovuna. Tær, ið eru har nú, eru ov grunnar.

- Ynskja eina gøtu frá nýggja býlinginum oman til skúlan.
- Ynskja, at vøllurin, sum varð søktur um seinasta skúlaár, verður gjørdur. Peningur er longu játtaður, og málið liggur hjá kommununi.

**Trivnaðarátøk hjá næmingaráðnum í Miðdeild:**

- Felagsspøl fyri Miðdeild verða 25. november.
- *Champions League*-kapping fyri Miðdeild verður 20. januar.
- *Hvør veit*-kapping verður 15. mars.
- Hugnakvøld verður 5. mars í skúlatíðini. Næmingaráðið metir, at tað er lættari at halda stýr á, um tiltakið er í skúlatíð.

---

**2. Næmingaráðið í Hádeild á fundi við skúlastýrið**

**Umboð:** Eva og Jóannes

Næmingaráðið í Hádeild arbeiðir eisini við ymiskum evnum. Hetta vóru høvuðspunkini, sum tey løgdu fram fyri skúlastýrinum:

- Ynskja at fáa sápu í brúsurnar.
- Ynskja fleiri ruskíløt, bæði á deildini og á miðøkinum.
- Ynskja betri reinføri í brúsurúmunum – har er ofta alt ov skitið.
- Ynskja, at hugna verður meira um á deildini.
- Ynskja fleiri lutir at spæla við í fríkorterunum.
- Ynskja at fáa næmingaráðskassan upp aftur í Hádeild, so næmingar kunnu senda mál inn til ráðið.
- Ynskja borð við skuffum í skúlastovurnar.
- Ynskja at fáa *bob*-spæl til Hádeild.

**Trivnaðarátøk hjá næmingaráðnum í Hádeild:**

- Hugnadagar verða fyriskipaðir av næmingaráðnum.
- Morgunmatur – næmingaráðið skipar fyri.
- Biograftúr verður í viku 51 fyri Hádeild.

---

### 3. Felags avgerð hjá næmingaráðunum

Næmingaráðini í mið- og hádeild hava samtykt at gera reglur fyri fríkorterini, tá kavi er.

---

### 4. Avgerð hjá skúlastýrinum viðvíkjandi Á-handlinum

Næmingar í Miðdeild skulu sleppa at keypa í Á-handlinum eina ferð um vikuna.
Foreldur skulu geva skrivligt loyvi, um næmingarnir skulu keypa.

Næmingar í Hádeild skulu lata inn foreldraváttan, um teir skulu keypa í Á-handlinum.

---

### 5. Batt og bóltar til borðtennis

Avgjørt varð, at hvør flokkur fær tvey batt og nakrar bóltar.
Flokkarnir hava ábyrgdina av at ansa eftir útgerðini.

---

### 6. Gøtan frá skúlanum oman til nýggju útstykkingina

Í samráð við næmingaráðini varð avgjørt, at næmingaráðini gera eitt skriv til kommununa viðvíkjandi ynskinum um at fáa eina gøtu millum nýggju útstykkingina og skúlan.